14/9-2002 – 10/5 2003

# Vetrarferðaætlan fyri M/F Norrönu

## Ferðaætlan fyri M/F Norröna 14.09.2002 – 30.12.2002

| Siglingarleið | Dagur | Koma | Fráferð | September | | | Oktober | | | | November | | | | Desember | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hanstholm | Leygardag | 13.00 | 17.00 | 14 | 21 | 28 | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | 30 | 07 | 14 | 21 | 28 |
| Lerwick | Sunnudag | 15.00 | 16.00 | 15 | 22 | 29 | 06 | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 |
| Tórshavn | Mánadag | 06.00 | - | 16 | 23 | 30 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | 25 | 02 | 09 | 16 | 23 | 30 |
| Tórshavn | Hósdag | - | 22.00 | 19 | 26 | 03 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | 28 | 05 | 12 | 19 | 26 | |
| Lerwick | Fríggjadag | 12.00 | 13.00 | 20 | 27 | 04 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 06 | 13 | 20 | 27 | |

## 02.01.2003 – 10.05.2003

| Siglingarleið | Dagur | Koma | Fráferð | Januar | | | | | Februar | | | | Mars | | | | | April | | | | Mai | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hanstholm | Leygardag | 13.00 | 17.00 | - | 04 | 11 | 18 | 25 | 01 | 08 | 15 | 22 | 01 | 08 | 15 | 22 | 29 | 05 | 12 | 19 | 26 | 03 | |
| Lerwick | Sunnudag | 15.00 | 16.00 | - | 05 | 12 | 19 | 26 | 02 | 09 | 16 | 23 | 02 | 09 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 04 | |
| Tórshavn | Mánadag | 06.00 | - | - | 06 | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 | 03 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | 28 | 05 | |
| Tórshavn | Hósdag | - | 22.00 | 02 | 09 | 16 | 23 | 30 | 06 | 13 | 20 | 27 | 06 | 13 | 20 | 27 | 03 | 10 | 17 | 24 | 01 | 08 | |
| Lerwick | Fríggjad. | 12.00 | 13.00 | 03 | 10 | 17 | 24 | 31 | 07 | 14 | 21 | 28 | 07 | 14 | 21 | 28 | 04 | 11 | 18 | 25 | 02 | 09* | |

* Koma Hanstholm leygardag 10.05. kl. 13.00

### Einvegis ferðaseðlakostnaður fyri hvønn

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað | Luksus-kamar | Bilar undir 5 m. | Eyka metur | Motor-súkklur | Súkklur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar – Danmark ella hinvegin | 1.200,- | 1.520,- | 2.240,- | 720,- | 160,- | 280,- | 80,- |
| Føroyar – Hetland ella hinvegin | 720,- | 900,- | 1.180,- | 440,- | 80,- | 180,- | 20,- |
| Danmark – Hetland ella hinvegin | 720,- | 900,- | 1.180,- | 440,- | 80,- | 180,- | 20,- |

### Bilpakkar Tórshavn–Hanstholm ella hinvegin

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað | Luksus-kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 Pers. | 4.200,- | 5.160,- | 7.560,- |
| Bilur + 3 Pers. | 3.080,- | 3.800,- | - |
| Bilur + 2 Pers. | 2.360,- | 2.840,- | 4.040,- |

### Bilpakkar Tórshavn–Lerwick ella hinvegin

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað | Luksus-kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 Pers. | 2.540,- | 3.100,- | 3.980,- |
| Bilur + 3 Pers. | 1.880,- | 2.300,- | - |
| Bilur + 2 Pers. | 1.420,- | 1.700,- | 2.140,- |

2 fyri 1
*ferðist tvey – gjaldið fyri ein!*
*galdandi til og við 3. mai 2003*
*Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn – Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað*
**2.990,-**



2 fyri 1
*ferðist tvey – gjaldið fyri ein!*
*galdandi til og við 3. mai 2003*
*Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn – Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað*
**2.200,-**



### Shetlands Cruise hósdag – mánadag

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Quenns Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

### Pakkaferð við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Quenns Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri Shetlands-cruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum. Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur.
Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar, eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

### 1 vika í summarhúsi í Easterhoull Chalets
2 vaksin og 2 børn v. bili

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |



### Danland –
**2 vaksin og 2 børn við bili**
galdandi frá 14.09.2002 til 10.05.2003

| Blokhus • Ebeltoft (myndin) • Hirtshals | |
|---|---|
| Gisting 7 nætur | 4.995,- |

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.
Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum.
Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark. Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen – Møn, Blåvand og Bornholm



### Pakkaferð við gisting á hotelli
**Fyri hvønn við 2 ferðandi í bilinum**
galdandi frá 14.09.2002 til 10.05.2003

| Gisting | Hotel Hanstholm Hanstholm | Park Hotel Aalborg |
|---|---|---|
| 7 nætur | 3.290,- | 3.350,- |
| | Hotel Excelsior Keypmannahavn | |
| | 3.795,- | |

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.
Uppihald nevnda dagatal á omanfyrinevndu hotellum í dupultkamari við WC/bað.
Á hotellunum er morgunmatur íroknaður.

team85

SMYRIL LINE
e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
Tel 34 59 00




Røktarfrágreiðing um Landssjúkrahúsið:

# Nógv meira ambulant

**Soleiðis ljóðar ein av niðurstøðunum í røktarfrágreiðin, sum danskur stovnur hevur gjørt fyri Landssjúkrahúsið. Eisini hevur Landssjúkrahúsið verið merkt av leiðslutrupulleikum seinnu árini. Sjúkrahússtjórin lovar, at frágreiðing ikki fer at at savna støv**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Heri á Rógvi*

Fyri einum góðum ári síðani varð semju gjørd millum sjúkrasystrarnar á B6 og leiðsluna á Landssjúkrahúsinum. Áðrenn semjuna vóru sjúkrasystrarnar á B6 ovast á breddanum í at kalla øllum fjølmiðlum, tá tær mestsum allar søgdu seg úr starvi, tí arbeiði hjá teimum kendist alt ov møtumikið, og kreftirnar vóru brúktar upp.

Í kjalarvørrinum á hesari ósemjuni valdi leiðslan á Landssjúkrahúsinum at seta eina kanning í verk. Kanningin – óheft – skuldi siga leiðsluni nærri um støðuna á sjúkrahúsinum. DSI (Dansk Institut for Sunhedsvæsen) hevur staðið fyri kanningini. Kanningin skuldi siga nakað um røktaruppgávurnar og starvsfólkanýtsluna á Landssjúkrahúsinum. Tríggjar medisinskar deildir vórðu umrøddar í frágreiðingini, t.e. B6, B8 og E2/E3. Eisini varð samanborið við sjúkrahús í Sønderborg og Svendborg.



*Anni Ankjær frá DSI, segði á tíðindafundi, at støðan á Landssjúkrahúsinum var ikki verri enn á øðrum sjúkrahúsum, men tað var eyðsæð, at kreppan hevði sett síni spor*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Ambulant

Í frágreiðingini eru ymsar niðurstøður. Ein er soljóðandi:

–Røktaruppgávurnar verða fakliga loystar eins væl á Landssjúkrahúsinum, sum á teimum donsku sjúkrahúsunum. Mannagongdirnar eru sum heild væl gjøgnumhugsaðar. Samanborið við hini sjúkrahúsini (Svendborg og Sønderborg, blðm.), so liggja sjúklingarnir inni í longri tíð á Landssjúkrahúsinum, men tað eru góðir møguleikar fyri at fremja umleggingar, so fleir sjúklingar kunnu verða viðgjørdir uttan innlegging. Sum heild eru fysisku karmarnir ikki góðir og tørvurin á nýggjari útgerð er stórur, stendur at lesa í frágreiðingini.

Tá tosað verður umleggingar, so verður hugsað um umleggingar frá innleggjan til ambulantan viðgerð.

Anni Ankjær, sum umboðaði DSI á tíðindafundi fríggjamorgunin, segði, at júst hetta við ambulantari viðgerð var stóri munurin á Landssjúkrahúsinum og øðrum donskum sjúkrahúsum.

Frágreiðingin sigur eisini, at á tveimum deildum eru ov fá starvsfólk. Eisini verður sagt, at fíggjarstýringin er ikki nóg góð.

## Leiðslutrupulleiki

Skiftandi leiðslan og vantandi støðutakan hevur eisini verið ein trupulleiki hjá Landssjúkrahúsinum, sambært DSI.

Núverandi leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur tó góðar vónir til, at hendan frágreiðing fer at geva positiv úrslit.

–Vit eru sera fegin um hesa frágreiðingina. Hon fær ikki loyvi til at savna støv. Í henni eru fjúrtan góð tilmæli, sum vit ætla okkum undir at seta í verk. Summi kunnu eisini gerast uttan øktan fíggjarkapasitet, sigur Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri.

Sjúkrahúsleiðslan fer í næstum at seta fleiri bólkar at arbeiða við betringum, sum eru tilmælt í frágreiðingini. Okkurt verður longu sett í verk við ársbyrjan 2003.

–Umleggingarnar fara at krevja tíð og pengar. Vit mugu eisini í framtíðini tillaga okkum eftir teimum pengum, vit fáa játtaðar, sigur Poul Geert Hansen.

Ingun Gaardbo, deildarleiðari á B6:

# –Eitt stórt stig

*Ingun Gaardbo heldur, at hendan frágreiðingin, sum hon hevur bíðað eftir, kann seta ferð á betringarnar av arbeiðsviðurskiftunum á B6*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



**–Hetta er eitt stórt stig á leiðini. Eg eri samd í teimum niðurstøðum, ið eru kanningini, sigur Ingun Gaard, deildarleiðari á B6**

B6
*Heri á Rógvi*

Tað er eitt ár síðani, at vit seinast hoyrdu frá B6. Sum partur av semjuni 1. januar 2002 vórður fleiri starvsfólk sett á B6 í eitt hálvt ár. Hesi fólkini eru komin og farin, og nú er alt við tað gamla á B6. Ein munur er tó: Nakað av nýggjari útgerð er komin til deildina.

Ingun Gaardbo, sum er virkandi deildarleiðari á B6 og starvsfólkaumboð, sigur, at hon er samd við niðurstøðunum um B6 í røktarfrágreiðingini. Niðurstøðan hjá DSI, sum hevur skrivað frágreiðingina, er, at B6 hevur ein lága normering og eina minni nýtslu av røktarstarvsfólki til hvønn sjúkling – samanborið við sjúkrahúsini í Svendborg og Sønderborg.

Tilmæli hjá DSI er, at fleiri sjúklingar skulu viðgerðast ambulant, og fer hetta væntandi at lætta nakað um arbeiðsbyrðuna.

–Hetta er eitt stórt stig á leiðini. Vit vilja nú hyggja frameftir og saman við leiðsluni (á Landssjúkrahúsinum, blðm.) finna fram til, hvussu vit betra um arbeiðskorini, sigur Ingun Gaardbo. Ein trupulleiki við B6 var, at deildin ikki fekk hildið seg innanfyri teir fíggjarligu karmarnar. Eisini var talan um hópin av sjúkradøgum. Bæði leiðslan og sjúkrasystrar eru tó í góðari vón um, at tað fer at eydnast at betra um karmar og trivnað.

Í frágreiðingini stendur annars, at útgerðin á deildunum er avoldað og niðurslitin.


*Ger vakurleika til veruleika*

Vitjan av ORIGINS SERFRØÐINGI
í húðrøkt og make-up
frá 03.-07. september



ORIGINS
RING OG FÁ TÍÐ

Einaumboð
í Føroyum

parfumari
Drós
Bøgøta 15 • Boks 24
Tel. 314811 • Fax 314877

Sosialurin 311820